# FS Vágar nærkast 1.deild



*FS Vágar vann aftur hetta vikuskiftið, og nærkast uppflyting. Hjá HB stendur verri til, tí liðið er nú niðast í 2. deild*

*Mynd: Savnsmynd*

**Nú skal standa rættiliga illa til, um FS Vágar ikki verður í 1. deild komandi kappingarár**

2. DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Við einum sannførandi 4-0 sigri á HB leygardagin, tók FS Vágar eitt risa stig ímóti uppflyting til 1.deild.

Størsti kappingarneytin til fyrsta plássið í aðru deild, Sumba, tapi sín dyst, so nú skal standa illa til, um vágaliðið ikki verður at síggja í fremstu føroysku fótbóltsdeildini komandi kappingarár.

### FS Vágar nógv betri

FS Vágar var nógv tað betra liðið á vøllinum í Sandavági leygardagin. Meðan tað í fyrra hálvleiki leikaði nøkunlunda javnt á, so var heimaliðið nógv betri í seinna hálvleiki. Vágaliðið hevði fleiri málmøguleikar, og úr Vágum verður sagt, at sigurin kundi verið væl størri.

Tað kom bert eitt mál í fyrra hálvleiki, og kom tað beint fyri hálvleik. Úr 20 metra fjarðstøðu, eydnaðist Bjarna Prior við góðum skoti, sum rakti innarsíðuna av stongini, at leggja FS Vágar frammum.

Hálvleiksleiðslan var eisini uppiborin, tí vágamenn høvdu yvirvág í spæli, vóru eisini meira ágangandi enn gestirnir úr Havn. Úr Vágum verður sagt, at serliga í fyrstu tjúgu minuttunum í fyrra hálvleiki hevði heimaliðið fleiri málmøguleikar, men í mál vildi bólturin ikki.

Seinni hálvleikur var ikki meir enn byrjaður, so var FS Vágar-framherjin, Bjarni Prior, aftur á blettinum. Eftir innlegg úr vinstru, er Bjarni fyrstur við nærmastu stong, og kundi leggja FS Vágar frammum 2-0.

Í seinna hálvleiki var stórur munur á liðunum, og úr Vágum verður sagt, at HB hevði sera lítið at bjóða uppá, og at álopini skolaðu oman á HB-málið. Tá góður tími var farin av dystinum, økti Kim Poulsen um leiðsluna. Hann snýtti fleiri HB-verjuleikarar, og varð leysur við HB-málverjanum, og kundi lættliga leggja bóltin framvið málverjanum til støðuna 3-0.

Kim var aftur upp á spæl løtu seinni, og aftur hesaferð snýtti hann fleiri HB-verjuspælarar, og ótarnaður økti hann enn einaferð um leiðsluna.

Ikki fleiri mál komu í dystinum, hóast málmøguleikar vóru til tess, og við sigrinum er FS Vágar nú átta stig frammanfyri nummar tvey.

### HB niðast

Við ósigrinum er annað lið hjá HB á niðasta plássinum í 2.deild, og hava havnarmenn tapt allar dystirnar í seinnu hálvu. Komandi vikuskiftið koma runavíkingar á vitjan í Gundadali, og tá fær HB møguleika at venda ringu gongdini seinastu dystirnar.

Komandi vikuskiftið fær FS Vágar vitjan av B71,og fær vágaliði fulla úrtøku, so eru teir nærum tryggjaðir uppflyting. Teir eru í løtuni níggju stig frammanfyri sandoyingar, og við einum sigri, verða 12 stig á muni, við bert 15 møguligum stigum at spæla um, so tá skal vera løgið, um FS Vágar ikki verður at síggja í 1. deild komandi ár.

**Dysturin í tølum:**
**FS Vágar-HB 4-0 (1-0)**
1-0 Bjarni Prior
2-0 Bjarni Prior
3-0 Kim Poulsen
4-0 Kim Poulsen

# VB av aftasta plássinum

**Við sigrinum á NSÍ, hevur VB flutt seg frá niðasta plássinum har vágbingar annars hava ligið stóran part av kappingarárinum**

2. DEILD MENN
Páll Holm Johannese

Tað var umráðandi hjá báðum liðum at fáa trý stig, tá NSÍ og VB hittust í Runavík leygardagin. Serliga vágbingar høvdu stigini fyri neyðini, tí teir høvdu møguleikan at sleppa vekk av niðasta plássinum, um úrslitini annars vóru teimum til vildar.

NSÍ hinvegin kundi við einum sigri koma uppá annað pláss, og harvið verða við í stríðnum um heiðursmerki.

### Lítil ferð á

Byrjanin av dystinum var heldur linlig. Nógv spæl gekk fyri seg millum teir báðar brotsteigarnar, og fáir møguleikar vóru. Sum fyrri hálvleikur leið setti NSÍ meiri ferð á, og komu runavíkingar eisini fram til onkrar góðar málmøguleikar, sum kundu givið mál.

VB legði størri dent á verjupartin, fyri síðani at royna seg við mótálopum. Hetta eydnaðist eisini væl, og tað var uppá eitt slíkt mótálop at VB eftir eitt gott korter kundi leggja seg á odda. Dan Djurhuus bleiv spældur fríur og setti bóltin trygt í málið.

Restin av fyrra hálvleiki gekk fyri seg uppá sama hátt. NSÍ hevði bóltin meira, meðan VB helt seg eitt sindur aftur og bíðaði eftir møguleikum fyri mótálopum.

Beint sum ein trúði at fyrri hálvleikur skuldi endað 1-0, svóvu verjuleikararnir hjá NSÍ eina løtu, og brádliga stóð 3-0 til VB. Í seinasta minuttinum eydnaðist Birgir Jørgensen at skjóta tvey mál, so vágbingar kundu fara til hálvleik við einari tryggari leiðslu.

Okkurt skuldi henda hjá NSÍ til seinna hálvleik, skuldi runavíkingar fáa nakað burturúr dystinum. Teir komu eisini út til seinna hálvleik við einum heilt øðrum vilja, og fingu lagt trýst á VB. Og tað gingu ikki meir enn átta minuttir, so var spenningur aftur í dystinum.

Jústinum Hansen fór einsamallur ígjøgnum VB-verjuna og setti bóltin í málið til 1-3.

### Nógvir málmøguleikar

Men hóast NSÍ nú royndi at koma fram á vøllin, so var tað sum um at liðið ikki megnaði at halda trýstið móti VB-málinum. Í staðin fingu vágbingar fleiri góðar møguleikar sum skuldu givið mál, og burdu teir havt avgjørt dystin langt fyrr enn hann veruliga bleiv avgjørdur.

VB gav NSÍ mønustingin tá tað restaðu okkurt um 10 minuttir. Tá kundi Símun Samuelsen skjóta bóltin framvið málverjanum hjá NSÍ, eftir at hann slapp at renna einsamallur móti málinum.

Hóast Mortan Hansen fekk minkað til 2-4 beinanvegin, so var tað ov seint hjá NSÍ. Í yvirtíðini fekk VB eitt mál aftrat, so endaliga úrslitið gjørdist 5-2 til vágbingar. Seinasta málinum stóð Símun Samuelsen eisini fyri.

Samanumtikið hevði NSÍ meira spæl, men sigurin hjá VB var uppiborin, tí vágbingar komu fram til nógvar møguleikar serliga í seinna hálvleiki, tá NSÍ kom langt fram á vøllin, í royndini at koma aftur í dystin

VB fekk tískil trý kærkomin stig, sum gera at vágbingar fara framum HB, sum sostatt nú liggur niðast. NSÍ misti møguleikan at koma uppá annað pláss í tí sera tøttu og jøvnu 2. deild.

**Dysturin í tølum:**
**NSÍ-VB 2-5(0-3)**
0-1: Dan Djurhuus
0-2: Birgir Jørgensen
0-3: Birgir Jørgensen
1-3: Jústinus Hansen
1-4: Símun Samuelsen
2-4: Mortan Hansen
2-5: Símun Samuelsen



# FM í Sprint triathlon 2002

**Tíðindaskriv**

Føroya Triathlon Felag skipar komandi sunnudag 25. august kl. 13.00 fyri FM í sprint triathlon, sum eisini er næstseinasta Grand Prix kappingin hjá felagnum.

Kappingin verður í Havn, og kappast verður soleiðis:

750 m svimjing, 20 km súkkling, 5 km renning

Fyrst verður svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, skal íðkarin skunda sær út á súkkluna, og verður súkklað frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her verður skift til renning, og runnið verður frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Runnið verður 6 ferðir runt. Íðkararnir verða bidnir at møta minst ein tíma áðrenn kappingarbyrjan.

Støðan í Grand Prix kappingini er hendan:
Samlaða støðan aftan á 4 umfør:



*Nú tvey umfør íresta í triathlon kappingini, liggur Gunnar Dahl Olsen fremstur samanlagt við 133 stigum*

*Mynd Savnsmynd*

| Menn | Stig |
|---|---|
| 1. Gunnar Dahl-Olsen | 133 |
| 2. Eli Christiansen | 128 |
| 3. Bogi Lenvig | 114 |
| 4. Hallur Stakksund | 110 |
| 5. Evald Rasmussen | 66 |
| 6. Kári Simonsen | 58 |
| 7. Beinir Rasmussen | 52 |
| 8. Dia Jacobsen | 30 |
| 9. Eyðtór Joensen | 36 |
| 10. Robert Vilhelmsen | 32 |

| Kvinnur | Stig |
|---|---|
| 1. Katrin Sørensen | 80 |
| 2. Rannvá Jacobsen | 74 |
| 3. Annika Jacobsen | 30 |
| 4. Brynhild Klein | 26 |

**Tilmelding á tlf:**
Evald Rasmussen 31 65 52
Gunnar Dahl-Olsen 31 90 30

# Landsliðsleikarar stóra framgongd:

**Tíðindaskriv**

Tá hondbóltslandsliðið var saman seinasta vikuskifti (9. og 10. august), varð kannað eftir, hvussu venjingarstøðan hjá leikarunum var, og úrslitini vístu sera stóra framgongd í mun til seinastu kanning. Seinast, venjingarstøðan hjá leikaranum varð kannað, var seinast í mai mánaða, og vanliga eru tað ikki mánaðirnir juni og juli, sum verða nýttir til at bøta um venjingarstøðuna, tí tá hava leikararnir vanliga ikki verið serliga virknir.

Ítøkiliga framgongdin í venjingarstøðuni var uppá góð 6 % í miðal hjá leikarunum í mun til støðuna seinast í mai mánaða.

Lars Nedergaard, landsliðsvenjari, hevur hesa viðmerking til framgongdina:

»Góða venjingarstøðan er eitt stórt plus til bæði leikarar og feløg teirra.

Fleiri feløg eru byrjað at venja fyrr enn vanligt, og nógv feløg hava eisini lagt áherðslu á at betra um styrkivenjingina. Sjálvur haldi eg, at feløgini her hava ásannað vánaligu venjingarstøðuna hjá leikarunum sum ein stóran trupulleika.

Landsliðsleikarar og feløg, sum dagliga hava trupult við at fáa atgongd til styrkivenjingarútgerð, hava útvegað ella eru við at útvega neyðuga útgerð.

Enn er tó langt á mál, men ein hugburðs-broyting er á veg, og um nøkur fá ár fara úrslitini av hesi broyting at vísa seg til stóran frama fyri føroyskan hondbólt bæði her heima og í kappingum uttanlanda.

Vit gerast kanska ongantíð heimsmeistarar, men við broytta og meira seriøsa hugburðinum hjá landsliði, leikarum og feløgum, verður stuðlar og fjølmiðlar helst skjótt greiðir yvir – eins og tað hevur víst seg í Danmark í fleiri ár eftirhondini – at hondbóltur er tann ítróttin, sum er best egnað at vísa í sjónvarpi. Seinasta kappingarár vórðu yvir 100 hondbóltsdystir vístir beinleiðis í donskum sjónvarpi, og fyritøkur úr øllum heraðshornum kappaðust um at fáa sølulýsingar í hallunum fyri á tann hátt at røkka út til áskoðarar og hyggjarar.

Jú, eg eri errin av, at feløg og leikarar hava brotið upp um armar.

Leikararnar kunnu ganga fattir, men hvørki eg sjálvur ella leikararnir eiga at leggja okkum fram á árarnar, tí enn er langt eftir á mál – vit eru enn á byrjunarstøði«, endar ein nøgdur venjari, sum væntar, at verandi landslið »toppar« um eini tvey ár.

## Jackways selir atgongumerki til FCK-Brøndby

ATGONGU-MERKJASØLA
*Páll Holm Johannesen*

Í samband við dystin millum FC Keypmannahavn og Brøndby leygardagin í Parkini, hevur náttklubburin Jackways, sum millum annað Todi Jónsson eigur í, keypt 100 atgongumerkir til stóra brakið í Parkini.

Øll atgongumerkini eru annars útseld til dystin, men nú er so møguligt at ogna sær atgongumerki gjøgnum Jackways. Av Jackways verður sagt, at enn er nøkur atgongumerkir at fáa, og bílegging kann fáast á e-meyl adressuni: mail@jackways.dk